# TILTØK

**Gudstænastur 25. okt.**
**Havnar kirkja:** kl. 11
Ann D. Hansen
**Hoyvík:** kl. 11
Lestur
**Vesturkirkja:** kl. 11
Heri Joensen. Sunnudagsskúli undir gudstænastuni. Talvan gongur fyri KFUM-skótarnar í Føroyum.
**Argja kirkja:** kl. 11
Bergur D. Joensen.
Altargongd. Sunnudagsskúli undir gudstænastuni. Talvan gongur fyri KFUM-skótarnar í Føroyum.
**Kirkjubøar kirkja:** kl. 12
Sverri Steinhólm. Altargongd. Talvan gongur fyri KFUM-skótarnar í Føroyum.
**Gøta:** kl. 12: Lestur.
Frá hesum sunnudegi verður í Gøtu aftur farið í kirkju á middegi kl. 12.
**Hvannasund:** kl. 12
Magnus Brahé Jørgensen
**Eiði:** kl. 12
Emil Olsen, messa. Á Eiði gongur talvan fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini.
**Sandavágur:** kl. 11
Inga Poulsen Dam og David Johannesen.
**Christianskirkjan:** kl. 11
Hanus á Gørðum
**Hvannasund:** kl. 12
Magnus Brahé Jørgensen
**Hvalvík:** kl. 12
Theodor. E. D. Olsen, altarg.
**Sjóvar kirkja:** kl. 12
Henning Bøgesvang
**Selatraðar kirkja:** kl. 18
Henning Bøgesvang, altarg.
**Viðareiði:** kl. 12
Elsa Funding
**Porkeri Kirkja:** kl. 12
Patrick de Neergaard, (Biskop Jógvan Fríðriksson, sp. Jónsvein Bech & sp. Símun Jacobsen deltage også ved gudstjenesten.)

**Gongutúrur**
Sunnudagin verður gongutúrur: Niðan við Høgadalsá oman við Tíggjará, Kaldbak. Hetta er ein miðaltungur túrur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10. Havið heit og góð gonguklæðir og ein heitan drekkamunn og matpakka við. Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

**Eysturoyar gongufelag**
Spákingartúrurin á Viðareiði verður sunnudagin 25. okt. Vit møtast við kirkjuna á Viðareiði kl. 12. Farið verður í kirkju og eftir guðstænastuna fáa vit eisini høvi at vitja prestagarðin, har m.a. sera áhugaverdir málningar eru. Viðingar fara at ganga við okkum í bygdini og greiða frá. Túrurin er lættur.

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Týskvøldið kl. 20
Bønar-og uppbyggingarmøti.

**Frelsunarherurin 85 ár,** *Tórshavn*
Týsdag kl. 20 Hornvenjing.
Mikudag kl. 15 Bøn.
Fríggjadag 23. okt. kl. 20 Hátíðarmøti í Eysturskúlanum. Kommandør Lydholms og onnur úr Noreg, Valby hornorkestur, løgmaður Kaj Leo Johannesen, biskupur Jógvan Fríðriksson og onnur luttaka. Kl. 23 skipa tey ungu fyri SANG CAFÉ í Frelsunarherinum. Sigurdur Ingemarsoon "SIGGI" úr Íslandi vitjar.
Leygardag kl. 12 Valby hornorkestur konsert á torginum í SMS. Kl. 15 byrjar vígslan av nýggja Herberginum á Dalav. 1. í Frelsunarherinum. Borgarstjórin Heðin Mortensen, Mortensen frá MAP arkitektum, FEAS leiðarin Tellefsen og onnur luttaka, áðrenn vit marsjera niðan á Dalaveg 1. Har vil landsstýriskvinnan í allmannamálum, Rósa Samuelsen flyta fram røðu, áðrenn leiðarin fyri Frelsunarherin Ì Noreg, Føroyum og Íslandi kommandør Carl Lydhom biður um Harrans signing yvir húsið og tey sum har koma at verða. Kl. 20 verður møti í Eysturskúlanum. og kl. 23 SANGLØTA við luttøku av Árna og Marner, Regin Haraldsen, Streingjakórið í Tórshavn, Suðuroyingum, Sangarar úr Noreg og Danmark, Tær fýra og onnur luttaka.
Sunnudag kl. 11 Møti í Eysturskúlanum. Sunnudagsskúli samstundis. Kl. 16 verður konsert (sangur og tónleikur) við Valby hornorkestur. Avslutningsmøti verður í Eysturskúlanum kl. 19. Framsýning av søgu Frelsunarhersins verður í Eysturskúlanum alt vikuskiftí. Øll vælkomin.
www.frelsunarherurin.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn og juniorar.
Mikudagin kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla, holdið hjá Bergur Debes Joensen.
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantveitsla. Holdini hjá Ann Dahl Hansen og Sonju Klein.

**KFUM & K í Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími við Hanus á Gørðum, Evni: Samfelaga teirra heilagu.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bønarløta. Kl. 18 møti við Gullak og Jónhildu. Kl. 21 ungdómsmøti
Mánadagin kl. 20 kvinnumøti við Onnu Dahl Olsen, presti.

**Ebenezer**
Týsdag
kl. 17.00 Frítíðararbeiði
kl. 20.00 Sangvenjing – Sangkórið
Mikudag
kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti – Talari: Poul Færø – Evni: 1. bræv Paulusar til Korint
Hósdag
kl. 12.30 Andakt
kl. 20.00 Ungdómsmøti – Talari: Rodmundur í Liða
Sunnudag
kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans – Talari: Helgi Mortensen
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Evangeliskt møti
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Fríkirkjan Oasan,** *Kirkjustræt*
Hósdagin kl. 17.30 Hip-Hop og Balet, kl. 20 Kvinnumøtið.
Fríggjakvøldið kl 20 After8
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Heðin Lamhauge, kl. 12 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 16.15-17 Barnakórið kl. 17-18 Ungdómskórið, kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Lívdin** *í Hoyvíkar skúla*
Týskvøldið samlast húsbólkarnir. Øll eru hjartaliga vælkomin
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Á familjumøtinum talar Anderw Berghamar um "Týdningurin av visiónum" Minna á Christmas Child innsavning av eskjum.
Kl. 11.30 Samfelagsløta
Kl. 12 Á seinna møtinum talar Jógvan Júst Rasmusen. Evni: Visiónir: Kostnaðurin av mótloysi.
Sunnudagsskúli kl. 12
Undir báðum møtinum verður barnaansing.
Møtini eru at hoyra beinleiðis á www.livdin.fo
Týskvøldið kl. 20 møti á Brekku
Leita á okkara heimasíðu, har ber til at hoyra nógvar sangir og talir. Øll eru hjartaliga vælkomin til møtini í Lívdini

**Lívsins Orð fyri vikuna**
Týsdagin kl. 17.30 Liljur
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønarmøti
Sunnudagin kl.10.30 Møti
Øll hjartaliga vælkomin

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagin kl. 18 Møti v. Heðin Jacobsen, Skopun. Fríbjørg Jensen syngur.

**Bygdarhúsið í Tjørnuvík**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við Malmberg og Bodil, Magda og Mai-Britt syngja. Øll eru vælkomin.

**Aglow klaksvík**
Týskvøldið kl. 20 verður møti á Soli Deo Gloria. Rannvá Royðutoft talar. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Óli Jacobsen, trúboðari, talar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Jónfríðu Justesen.

**Hebron, Argir**
Týsdag Kl. 19 Squash - Bíbliuløta fyri ung 5. - 8. flokk
Mikudag Kl. 10 Kvinnur biðja fyri børnunum.
Kl. 20 Bíbliutími og bønarløta. Thorvald Gaardlykke - Orðt. 2
Sunnudag Kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30 Samvera við drekka
Kl. 12 Felags sunnudagsskúli. Kl. 12.15 Møti - Allan Mortensen talar.
Hjartaliga vælkomin í Hebron

**Getsemane,** *Stangaskákið 1*
Týskvøldið kl. 19.30 er bíbliutími.
Hóskvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti.
Leygarmorgun kl. 10 er morgunbøn.
Sunnukvøldið kl. 18 er møti. Barnamøti er samstundis.

**Evangeliihúsið,** *Tróndargøta*
Mikudagin kl. 17.15 barnakórið venur. Hósdagin kl. 18.30 MiniSalt (fyri børn 9 ár og eldri) hjá Tórunn & Eyðun Miðberg, Suðurstíggjur 9.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Annika Berg talar um evni "Veðurlagsbroytingar, umhvørvi og eg í Kristusi".
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
www.gospel.fo

**Sjómanskvinnuringurin á Strondum**
kemur saman í missiónshúsinum týskvøldið kl. 19.30. Vit fáa vitjan av sjómanskvinnuringunum í Gøtu, Skála og Selatrað. Tað verður pakkafest og allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími v/ Dávur Thomassen Joh 21. 15-25
Mikukvøldið kl. 20 Venur felakskóri
Hósdagin kl. 16 Venur gentukóri
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/Dann Eliassen.
Leygardag kl. 13 Kvinnur í bøn. Í loftstovuni í Meinigheitshúsinum.
Sunnudagin verður eingi sunnudagsskúli, men familjumøti kl. 17 har sunnudagsskúla børn fara at syngja, tey børn sum ynskja at syngja við Barnakórinum skullu møta kl. 16.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Hóskvøldið møti kl. 20
Sunnukvøldið møti kl. 18 v/Atla Rasmussen

**Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Mánakvøldið kl. 20 Sjómanskvinnuringurin. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.
Týskvøldið kl. 20 Argjakórið venur
kl 20.30 Ungdómsmøti
Hóskvøldið kl. 17.30 Barnakórið venur
Kl. 20 Bíbliutími. Evni: Matt. 7
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/Mariann D. Poulsen

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Týskvøldið kl. 20 Bíbligutímið byrjar.
Mikukvøldið kl. 20 Venur Streingjakórið í Hvalvík.
Sunnudagin kl. 18 Møtið við Pól Johannesen, Trúðboðara Klaksvík

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími Matt. 26. kap.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bøn- & lovsangur. Kl. 18 møti v/Jógvan Lamhauge og Klæmint Sólsker. Innsavnan til húsið.

**Missjónshúsinum á Selatræð**
Sunnudagin kl. 18 verður møti. Talarar verða: Sylverius Jacobsen og Henry Jarnskor. Marita, jóhanna og halgerð úr vík syngja

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sjómanskvinnuringurin í Runavík kemur saman mánakvøldið kl. 19.30 í missjónshúsinum. Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20 við Teodor Olsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikukvøldið kemur Sjómannskvinnuringurin saman 21. okt. kl. 20.
Allar kvinnur eru vælkomnar

**Missiónshúsið í Oyndafirði**
Leygarkvøldið kl. 20 verður møti við luttøku úr Leirvíkar missiónshúsi. Øll eru vælkomin

**Sjómanskvinnuringurin í Gøtu**
fer til Strendur týskvøldið 20. okt. Farið verður úr Gøtu kl. 19. Viðv. farti, vinarliga sigi frá hjá Ásu tlf. 225182. Allar kvinnur eru vælkomnar við.

**Missiónsvikan**
verður í Haldórsvík frá 5. - 8. nov

**Filadelfia,** *Landavegur 22*
Mikudagin kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum. Kl. 18 Delli, børn 3.- 6.fl.
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími við Alex O'Campo
Leygarkvøldið kl. 20 Flare, Josva Meitilberg talar
Sunnudagin kl. 11 Familjumøti /Christmas Child
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin
www.filadelfia.fo

**Filadelfia Vágar**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti
Sunnudagin kl. 11 Møti við Pola og Súsonnu. Sunnudagsskúli kl. 11.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Losjan í Havn**
*Tinghúsvegur 18*
Hvønn fríggjadag kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman** *Yviri við Strond*
Hvønn sunnudag kl. 18 er Evangelisk møti "Ein nýggj byrjan". Øll eru vælkomin.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin Vit hyggja at endanum á filminum. Høvi er eisini at keypa av heimalitaða tóvnum. Mikudagin fimleikur og stuttligar royndir. Høvi verður hesa vikuna at tekna seg til busstúrin 28. okt.
28. okt. verður farið busstúr inn í Eysturoynna. Fari verður úr Skopun kl. 08.10 og av Gomlurætt kl. 17.15. Nærri skrá seinni. Neyðugt er at melda til túrin.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Tilhaldið í Tórsgøtu,
tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Opið er mánadag til fríggjadag kl. 9-17.
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
**Týrur 21. okt.:**
Oyndarfjarðar og Hellurnar. Frásøgufólk: Justinus Ejdesgaard. Úr Steinatúni kl. 13 og aftur í Havnini uml. Kl. 17. Kostnaður 100,-. Gjaldast mánadagin 19. okt.
**Týsdagur**
Kl. 15 Brot úr apoteksøguni og kunning um broytingar í tilskotsskipanini frá sjúkrakassa og Almannastovu, Heri Mørkøre, landsapotekari. Øll eru hjartaliga vælkomin.
**Mikudagur**
Kl. 9 Maskinbinding, Marita Guttesen.
Kl. 9 Veving, Joana Bjarnastein.
Kl. 9 Bindiklubburin. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 10 -13.30 Matgerð, Bjørk Hendriksen. Nøkur pláss eru. Tilmelding: 316491.
**Hósdagur**
Kl. 9-11.15 Bólkur 1, Óroynd, Tekstviðgerð grundskeið, Páll Poulsen.
Kl. 11.45-14 Bólkur 11, Roynd, Tekstviðgerð grundskeið, Páll Poulsen.
Kl. 14.15-16.30 Bólkur 111, Leita og samskifta á alnótini, Páll Poulsen.
Kl. 10 Fimleikur, Greta Ellingsgaard. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 11 Lesibólkurin: Vit lesa: "Børnene" Ida Jessen. Hittast 29. okt. Vit halda til á bókasavninum. Øll áhugaði eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 14-15 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
**Fríggjadagur**
Kl. 9-17 Bindiklubbur.
Kl. 10-13.30 Magerð, Bjørk Hendriksen. Nøkur pláss eru. Tilmelding: 316491.
Kl. 15 Fimleikur, Dánjal Húsgarð.
*Øll eru hjartaliga vælkomin. Opið hús. Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Pensionistafelagið í Havn**
Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Telefon: 22 27 33
E-mail: finnurj@post.olivant.fo

**Eldrafelagið Nón**
Opið hús mánadag til fríggjadag kl. 14.30-17.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mána- týs- og hósdag frá kl. 13 til 17.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Vági**
Hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll vælkomin.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag til hósdag
kl. 13.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleikí er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.***

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15 til 18. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.